# Fiskidagaskipan slepp

**- Politiski myndugleikin hevur øll árini broytt fiskidagaskipanina – og sum oftast tann skeiva vegin, heldur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna, Auðunn Konráðsson**

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Auðunn Konráðsson, sum var ein av fyriskiparunum av fiskivinnuráðstevnuni í Klaksvík á Føroya Sjómannadegi, er eisini formaður í Meginfelag Útróðrarmanna.

Í grein í faldara, sum fyrireikararnir lótu fólk fáa á ráðstevnuni, sigur hann, at politiska skipanin ikki hevur gjørt sær greitt, at tað einasta, ið kann føra til skerjingar í fiskidagatalinum, er økt veiðiorka í flotanum.

- Tað amboðið, sum átti at stýrt fiskidagatalinum, finst ikki, sjálvt um vinnan hevur ávíst hetta í fleiri ár. Hetta amboð er ein álítandi kanning av økingini í veiðiorkuni – frá tí, at fiskidagaskipanin varð sett í gildi og fram til dagin í dag.

## Einki 0-punkt

Auðunn heldur, at ein tann størsti vansin við fiskidagaskipanini er, at veiðiorkan ikki varð máld, skip fyri skip, tá ið skipanin varð sett í gildi.

- Hevði hetta verið gjørt, hevði skipanin havt eitt 0-punkt, sum merkir, at øll øking í veiðiorku tá hevði tikið støði í hesum 0-punkti.

Formaðurin í MÚ vísir á, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, ætlar at skipa so fyri, at ein nevnd fer undir at kanna møguligar broytingar í veiðiorkuni.

- Eg haldi tað vera sera umráðandi, at vinnan sleppur upp í part at mynda arbeiðssetningin, um líkinda úrslit skal spyrjast burtur úr.

## Allir "vita"...

- Sjálvt um vit javnan hoyra av tingsins røðarapalli, at "allir føroyingar vita", at veiðiorkan er økt ógvusliga og kanska er fleirfaldað, so er hetta ikki veruleikin.

Auðunn sigur, at í vinnuni eru menn vísir í, at fleiri skipabólkar hava ikki økt sína veiðiorku í támindi av teimum prosentum, sum fiskidagarnir hesi árini eru skerdir.

- Tað verður ongantíð ov ofta staðfest, at fyri at gundgeva fyri skerjing av fiskidøgum, er neyðugt við eini nágreiniligari kanning av veiðiorkuni. Túnatos og gitingar, kunnu ikki brúkast í slíkum álvarsmáli, sigur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna.

Hann leggur aftrat, at spurningurin, hvussu fiskastovnarnir eru fyri, og hvussu umstøðurnar annars eru, hevur einki við talið av fiskidøgum at gera.

## Sjálvregulerandi

Eins og mangir aðrir undan honum, ásannar Auðunn Konráðsson, at ætlanin við fiskidagaskipanini var, at hon í sínum uppruna skuldi vera ein sjálvregulerandi skipan.

- Men tíverri hevur tað víst seg, at fiskidagaskipanin er ikki sloppin at standa sína roynd, tí politiski myndugleikin øll árini hevur broytt skipanina – og sum oftast tann skeiva vegin, leggur hann aftrat.

## Hava góð kor

Formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna fýlist eisini á, at skattalættin hjá sjófólki aftur kom í andglettin herfyri.

- Ávísir politikarar síggja avtøku av skattalættanum sum tann einasta heilivágin móti hitnandi búskapinum í landinum. Eg haldi tað vera ótrúligt, at hetta málið aftur er komið upp á venda á politiskum plani – um somu tíð, sum tað gongur illa at manna okkara skip, samstundis sum næstan eingin ungdómur velir sær fiskiflotan sum sítt arbeiðspláss, sigur Auðunn Konráðsson.

## Út á síðulinjuna

Avbjóðingarnar í fiskivinnuni eru nógvar.

- Við glóðheitum búskapi, vónum um at finna olju og einari visjón 2015 sum leggur upp til, at Føroyar verða ein "idéfabrik" heldur enn ein "filéfabrik", er líkt til, at fiskivinnan er á veg út á síðulinjuna í politisku skipanini.

At enda, heldur Auðunn Konráðsson, at Føroyar enn bara hava tað eina beinið at standa á búskaparliga.

- Tí skal fiskivinnan hava so góð kor at virka undir sum gjørligt, sigur formaðurin í Meginfelag Útróðrar manna.



*Auðunn Konráðsson, sum á myndini situr millum Meinhard Jacobsen og Bjørn Kalsø, heldur, at túnatos og gitingar kunnu ikki brúkast til nakað. – Vit mugu hava eina nágreiniliga kanning av veiðiorkuni sum grundarlag undir tillaging av fiskidagaskipanini, sigur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*- Í vinnuni eru menn vísir í, at fleiri skipabólkar hava ikki økt sína veiðiorku í námindi av teimum prosentum, sum fiskidagarnir hesi árini eru skerdir, sigur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Bankir

